# Smalt vegastrekki í mong ár aftrat

**Eingin vegbreiðking verður gjørd gjøgnum Skipanes í nærmastu framtíð. Enn liggur eitt øki í bygdini um eitt ótøki.**

VEGAGERÐ
*Snorri Brend*



*Eingin vegagerð gjøgnum Skipanes enn á sinni*

*(Mynd: Runavíkar kommuna)*

**Skipanes:** Tey sum dag og dagliga koyra gjøgnum Skipanes hava helst mangan undrað seg.

Tey hava undrað seg um, tað vegastrekkið innast í bygdini. Eitt vegastrekkið sum hevur ligið órørt soleiðis í mong ár.

Eingin hevur rættiliga dugað at sagt frá, hví hetta bara liggur soleiðis hálvbyrjað, men sum aldrin er vorðið fullført.

Hetta ynskti nú tingmaðurin, Kári P. Højgaard at fáa eitt svar uppá. Tí setti hann herfyri fram ein fyrispurning um hetta til landsstyrismannin, Bjarna Djurholm.

### Ikki nøktandi

Tingmaðurin ynskti at frætta nærri um, hvørjar ætlanir vóru við hesum vegastrekkinum.

Hann spurdi tí landsstýrismannin um nakrar ætlanir vóru við hesum arbeiðinum, og um hvat bleiv av ætlaðu vegbreiðkingini í bygdini.

Víst varð á, at hetta vegastrekkið gjøgnum bygdirnar Skipanes og Undir Gøtueiði ikki eru nøktandi.

Nakað av gróti er lagt vesturav vegnum, men liggur hetta í dag nærum sum eitt ótøki.

Kári P. Højgaard vísti á, at eini hús vórðu keypt fyri mongum árum síðani. Seinni vórðu hesi húsini niðurtikin fyri at betra um útsýnið og um trygdina.

- Men síðani tá er lítið og einki hent í hesum málinum, vísti Kári P. Højgaard á.

### Raðfesting

Í svarinum vísti Bjarni Djuholm á, at ætlanin í Skipanesi varð broytt.

Ætlanin varð nevniliga broytt, frá at leggja vegin í niðara síðu til at leggja vegin omanfyri bygdirnar ístaðin.

Víst varð á, at nógv vegastrekki kring landið lógu somuleiðis og bíðaðu eftir at verða gjørd, og at hetta arbeiðið í Skipanesi mátti tí ganga inn í eina raðfestingarætlan hjá landsstýrinum.

Landsstýrismaðurin gjørdi tó greitt, at tað vóru eingi tekin um at hesin vegateinurin fór at verða gjørdur tey næstu árini.

Tað sum mong í økinum kortini eru kedd um, er at vegurin niðanfyri bygdirnar skemmir tær, tí einki er gjørt fyri at hampa um.

Enn er so einki sum bendir á, at nakað verður gjørt fyri at bøta um hetta enn á sinni.

# So leikandi lætt um bygdina

**Tá veðrið er til vildar er ikki nóv annað at gera enn at fara sær ein túr oman í Nólsoyar bygd.**

BARNAGARÐUR
*Orð/mynd: Snorri Brend*



*Tey hava verið úti og fingið sær ein frískan túr. Nú bíðar matpakkin í barnagarðinum*

**Nólsoy:** Tað er ikki altíð at børnini tíma so væl at verða hildin innandura.

Og tá veðrið so er til tað, so er ikki nógv annað at gera enn at fara ein túr út við børnunum.

Tað var júst tað, sum starvsfólkini í barnagarðinum ”Leikalund” í Nólsoy gjørdu mikudagin í farnu viku.

Veðrið var av tí allarbesta um morgunin, og tí var ikki annað at gera enn at leita sær út í bygdina frá morgunstundini av.

Henda dagin vóru tey á veg til hús aftur, tá klokkan var farin at ganga til 11.

Tey høvdu verið uttandura í eina góða løtu, men nú var svongdin av álvara farin at gera um seg hjá børnunum.

- Nú er børnini vorðin so troytt, og nú fara vit heim at eta matpakkarnar, segði eitt av starvsfólkunum.

Í barnagarðinum Leikalund eru vanliga 25 børn í vøggustovuni og barnagarðinum. Starvsfólkini eru seks í tali.

# Skulu eisini hoyra Lindina



*Vestmenningar skulu eisini fáa høvið til rættiliga at hoyra sendingarnar hjá Lindini*

**Vestmanna:** Nú skulu vestmenningar eisini sleppa at hoyra andaligu sendingarnar á útvarpsrásini Lindini.

Henda rásin hevur nú verið at hoyrt seinastu fimm árini kring landið, men nú ynskir leiðslan í støðini eisini at fólk í Vestmanna skulu fáa høvið til rættiliga at hoyra tær dagligu sendingarnar.

Á bygdaráðsfundi í Vestmanna í farnu viku var eitt av uppskotunum á skránni frá Lindini. Fyrispurningur var, um kommunan vildi lata stuðul til keyp og uppseting av einum sendara í bygdini.

Fíggjarnevndin hjá kommununi viðmælti hesum uppskotinum, og tí fer kommunan nú at stuðla hesi ætlanini við 5000 krónum.

Einasta treytin fyri stuðlinum er, at sendinetið hjá Lindini ikki órógvar onnur sendinet.

**sb.**

# Innflutningurin minkar framvegis

**Hagtøl:** Virðið av innflutningi okkara er minni higartil í ár enn í fjør. Tað er bara olja í virði, sum tað verður innflutt meiri av, helst orsakað av príshækkingunum í seinastuni.

Hagtøl frá Hagstovuni vísa, at innflutningurin er minkaður við seks prosentum tríggjar teir fyrstu ársfjórðingarnar í ár – úr 2.762 til 2.597 mia kr.

Største minkingin er at finna í vørum til vinnuliga nýtslu: Innflutningurin av t.d. alifóðuri er minkaður við 90 mió. og til framleiðslu 80 mió. kr.

**sb.**

# Sama skattaprosent hóast hall

**Klaksvík:** Eftir tilmæli frá fíggjarnevndini samtykti býráðið hóskvøldið fíggjarætlanina fyri 2006.

Ein spurningur í samband við fíggjarætlanina fyri næsta ár var skattaprosentið. Og á fundinum varð samtykt at halda fast við verandi skattaprosent upp á 20,75.

Barnafrádrátturin verður somuleiðis óbroyttur: 4.000 kr.

Samanlagt gevur fíggjarætlanin fyri komandi ár kortini eitt hall upp á 27,4 mió. kr. Tá eru íløgur upp á 47,4 og avdráttir upp á 7 mió. kr. tald við.

**sb.**



*Fíggjarætlanin hjá Klaksvíkar kommunu gevur hall fyri 2006, men skattaprosentið verður kortini ikki hækkað*